

*Petur Jákup, beiggi Absalon, sum varð innistongdur í íshúsinum. Petur Jákup var giftur við Elspu Katrinu úr Húsgarði. Her er hann saman við einasta barni teirra Poul Anthon. Hann gekk burtur við Onnu í 1924. Antona, og helst fleiri onnur, er uppkallað eftir honum*

higar er komið. Næsta skipið Columbus varð keypt í 1925. Í 1930 keypti eg Tvey Systkin í Frankaríki. Um hesa tíðina byrjaði tann stóra krisan, ið hevur forðað so nógv fyri øllum framburði.

Eg havi fingist við sild á hvørjum ári, meira ella minni. Sildahandilin er sera trupul og torførur handil í allar mátar, og eftir mínum royndum gevur hann lítlan vinning, oftani tap.

Tá ið talað verður um, at føroyingar ikki duga at hagreiða sildina eins væl og aðrir, so er hetta ikki beint, men kann bert skyldast ókunnleika til tey sonnu viðurskiftini. Tað hevur verið so gjøgnum øll árini, at tá marknaðurin er tómur, hevur tann føroyska sildin altíð verið nógv seld og eftirspurd. Men tá ið marknaðurin er yvirfyltur av aðrari sild, ið er nógv feitari, er tað trupult hjá okkum at fáa avseting. Undir tílíkum viðurskiftum verður ofta sagt, at sild okkara ikki kann standa mát við aðra sild.

## Veiða eftir sild óstøðug

Tær royndir, eg havi gjørt í nógv ár, vísa, at vit ikki kunnu rokna við stabilari sildaveiðu á Føroya firðum á hvørjum ári. Tað hava verið nógv ár, tá so at siga eingin sild hevur fingist, og so aftur ár, hvar nógv hevur verið veitt.

Í fjør var fingið toluliga væl av sild, tó ikki av tí feitastu, men tá vóru marknaðarviðurskiftini so út av lagi ring, av tí at hin góða norska sildin fylti marknaðin, og einar 200 tunnur hjá mær fóru fyri skjeyti.

Í ár hevur fingist so nógv sild í Skálafirði, sum neyvan nakar minnist. Eg havi saltað o.u. 600-700 tunnur, herav úr Funningsfirði o.u. 150 tunnur.

Sum tiltak kann sildaveiðan vera ein góð inntøka, sum tað er vert at rokna við, men hjá fiskarum at leggja seg uppá land og hava sildaveiðu til livibreyð, tað fer neyvan at loysa seg. Tað er óvissur vinningur.

Føroyska garnasildin er líka góð sum onnur sild. Tann norska sildin vinnur yvir okkara mest harvið, at norðmenn steingja sildina inni í fjarðunum við sildalási, sum tað nevnist. Hetta førir við sær, at um æti er í sildini, so tømist tað úr henni, meðan hon stendur í lásinum. Tann góði kvaliteturin er tó altíð tað, sum hevur mest at siga.

## Føroyingar eta ov lítið av sild

Nakð herfyri kom eg at tosa við ein kendan norðmann, sum eg havi kent frá yngri árum, um eina hermetikkfabrikk í Føroyum. Hann er ógvuliga væl inni í føroyskum viðurskiftum. Hann helt at ein slík fabrikk avgjørt ikki vildi komið til at staðið seg her. Fyri at ein slík fabrikk skal standa seg má fyrst og fremst vera talan um sildatilførslur alt árið runt, og tað er jú ikki hugsandi her, hvar eingin sild fæst nógvar tíðir á árinum.

Føroyingar gera alt ov lítið av at eta sild. Vit liva í eini tíð, hvar sjálvforsýningspolitikkurin er tann ráðandi. Øll lond seta alt tað, tey eru ment, inn á at styðja ta heimligu produktiónina. Eg dugi ikki at síggja rættari enn, at vit føroyingar eiga at taka okkum saman um at fremja sildaspurningin við at eta meira sild enn higartil hevur verið gjørt. Sild er jú bæði góð og vælsmakkandi føði. Tað vildi havt nógv at siga, um vit árliga kundu selt fleiri hundrað tunnur av sild her á landi, í staðin fyri at vit sum er kanska ikki eta meira enn 100 tunnur árliga. Í hesi seinastu tíðini hava fólk tó víst størri interessu enn fyrr við at spyrja eftir føroyskari sild, og má tað nevnast sum eitt gleðiligt tekin. Persónliga trúgvi eg, at børn hava betri av at eta speygusild og egg enn kjøt.



*Hensia á 90 ára degnum*

## Nýggj og størri beding

Absalon Jacobsen hevur verið fyristøðumaður fyri Kongshavn Skibsværft síðan 1924, og tá ið tað nú hevur verið arbeitt upp á at avtaka ta gomlu bedingina liggur nær hjá okkum at spyrja, um ætlanin er at gera eina nýggja beding. Hr. Jacobsen svarar:

Nýggj beding skal nú gerast, og tað ætlast, at hon verður so sterk, at hon kann taka størri skip enn tey, sum higartil eru komin til landið.

Tað skal skoytast uppí, at tað tá henda greinin var skrivað leið móti endanum hjá virkinum hjá Absalon. Tað var eitt rættuligt bakkast fyri Absalon, at sonurin Dánjal Pauli doyði í 1936. Hann var annars ætlaður at taka yvir. Stutt eftir gavst Absalon.

Men hevði hann hildið áfram til kríggið í 1940, hevði hetta kanska bjarga virkinum, tí tá var peningur at vinna!!

## Heilsan til Hensiu, Antonu og Petru

Seinastu dagarnir hava verið hildnir tríggir stórir føðingardagar í ættini hjá Absalon á Dunga í Syðrugøtu. Tvíburarnir Antona og Petra f. Mikkelsen, ommudøtur Onnu Katrinu, systir Absalon, og Petur Paula í Barbustovu, gjørdust 80 ár.

Hensia Jacobsen, verdóttir Jákup, beiggja Absalon, giftur við Biritu, gjørdist 90 ár. Tað kann sigast um tær allar tríggjar, at tær eru fróðarfólk. Henda grein skal eisini vera ein heilsa til teirra, og ynskt verður øllum trimum hjartaliga tillukku.

*Kelda:*
Dimmalætting 1934



*Eitt av skipunum hjá Absalon, Columbus*

**Komandi partur**
Í komandi Miðviku verður fyrri partur av frásøgn hjá Ingibjørg Hansen, Gøtugjógv. Hon er ættað úr Hesti og misti pápan stóra skaðadagin í 1919

Sosialurin